

Húsarhaldsskúli Føroya

# Skeið á Húsarhaldsskúla Føroya 2009

## Lær at seyma buksur til tann føroyska búnan

**Vikuskiftisskeið 20. – 21. mars og 27. – 28. mars**

Skeiðið er fríggjadag frá kl. 13:00 – 19:00 og leygardag frá kl. 9:00 – 16:00
Undirvísari: Jenny Kastalag
Kostnaður fyri skeiðið er 800,- kr.
íroknað er døgurði og kaffi, ikki tilfar.

## Lær at seyma vest til tann føroyska búnan

**Vikusskeið 20. – 24. apríl**

Skeiðið er allar dagarnar fra kl. 9.00 til 16.00, tó fríggjadagin til kl. 15

Undirvísari: Jenny Kastalag
Kostnaður fyri skeiðið er 1000,- kr,
íroknað er døgurði og kaffi, ikki tilfar.

## Brodering til føroysk klæði og annað

**Vikusskeið 20. – 24. apríl**

Skeiðið er allar dagarnar fra kl. 9.00 til 16.00, tó fríggjadagin til kl. 15.

Frálæra verður givin í at tekna mynstur til fyriklæði og turriklæði til føroysk klæði úr føroysku floraðini, og í brodering og montering. Møguleiki er eisini at brodera og at tekna mynstur til ymisk annað, so sum gardinur og dúkar.

Undirvísari: Jutta Hansen
Kostnaður fyri skeiðið er 1000,- kr.
íroknað er døgurði og kaffi, ikki tilfar.





## Dominobinding, Patchworkseyming, føroysk bond eisini úr silvuri og kopari

**Vikusskeið 20. – 24. apríl**

Frálæra verður givin í grundteknikkinum í domino-binding. Spennandi og ørðvísi bindingarháttur, sum kann nýtast til alskyns ting og pløgg. Frálæra verður eisini givin í patchwork seyming, bæði við hond og maskin. Umframt verður møguleiki fyri at læra at virka hosubond, tóltra, bregda, eisini úr silvuri og kopari til smúkkur.

Skeiðið er allar dagarnar fra kl. 9.00 til 16.00, tó fríggjadagin til kl. 15

Undirvísari: Paulina Eliasen
Kostnaður fyri skeiðið er 1000,- kr,
íroknað er íroknað er døgurði og kaffi, ikki tilfar.

## Skeið í matvørureinføri/ heilsugóðum mati

**26. – 27. mars**

Skeiðið er frá kl. 9.00 til 16.00
Skeiðið er ætlað fólkum, sum arbeiða við mati á dagstovnum, sambýlum, kantinum o.ø
Undirvíst verður um:
Matgerð og goymsla. Hitaviðurskifti, bakteriuvøkstur, bakteriusløg, dálkan og krossdálkan.
Reingerð: Reingerðisevnir og goymsla, reingerð og reingerðisætlan.
Persónligt reinføri: Klæði og annað.
Kostráðini: Tilráðingar um heilsugóðan kost
Vørulýsingar: læra at lesa vørulýsingar

Undirvísarar: Joan Djordjevic og Jóhanna á Tjaldrafløtti Kostnaður: 2500,-kr
íroknað mat og tilfar

Tilmeldað skal verða í seinasta lagi 1 viku áðrenn skeiðið byrjar og tilmeldingin er bindandi. Møguleiki er fyri at gista á skúlanum til øll skeiðini.

Møguligt er at melda seg til skeiðini umvegis heimasíðuna www.husarhaldsskulin.fo.

Til handarbeiðskeiðini er ikki neyðugt at hava seymimaskinu við. Skúlin hevur øll seymiamboð.



Fleiri upplýsingar um skeiðini fáast við at venda sær til skúlan.
Viðmerkjast skal, at tað er avmarkað luttøka til øll skeiðini

Húsarhaldsskúli Føroya
Stoksoyrarvegur 29, 700 Klaksvík
Tlf. 456974 e-mail hsf@olivant.fo
www.husarhaldsskulin.fo

HSF